VIRÐING MENNING TRIVNAÐUR

# VIRÐI OG VISIÓN



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# TILGONGDIN

Virðistilgongdin tók støði í virðunum, sum frammanundan sermerktu arbeiðið í Tórshavnar kommunu. Við øðrum orðum varð tilgongdin bygd upp kring tey virði, sum longu vóru til staðar í dagliga virkseminum hjá kommununi, og sum hava verið við til at gera Tórshavnar kommunu til tað, hon er í dag.

Øll starvsfólkini fingu høvi at siga sína hugsan og tosa við starvsfelagar og leiðslu um, hvørji virði hava týdning fyri tey í arbeiðinum.

Síðani orðaði býráðið visiónina fyri Tórshavnar kommunu.



## TILGONGDIN VARÐ SKIPAÐ Í FÝRA PARTAR

### FYRSTI PARTUR

Fyrsti partur fór fram á stovnunum hjá kommununi, har einstaka starvsfólkið fekk høvi at leggja fram virði av týdning fyri tey sum starvsfólk í Tórshavnar kommunu. Samanløgdu virðini hjá stovninum vórðu síðani skrivað niður og send fyrisitingini at arbeiða víðari við í tilgongdini.

### ANNAR PARTUR

Stjórar og deildarleiðarar í kommununi savnaðu øll úrslit frá fyrsta parti. Tey lýstu á hesum grundarlagi grundvirðini hjá Tórshavnar kommunu.

### TRIÐI PARTUR

Býráðið gjørdi eina visión fyri Tórshavnar kommunu.

### FJÓRÐI PARTUR

Virði og visión verða sett í verk, og hesi skulu áhaldandi røkjast í árunum frameftir. Á henda hátt eru virði og visión verða ein natúrligur partur av arbeiðinum hjá starvsfólkum í Tórshavnar kommunu.

## SAMSKIFTISGONGD

**1. PARTUR**
Starvsfundur á stovnum/ fyrisiting

**2. PARTUR**
Grundvirðini vóru orðaði

**3. PARTUR**
Visiónin varð gjørd

**4. PARTUR**
Virði og visión verða sett í verk

VIRÐISGRUNDARLAG
TÓRSHAVNAR KOMMUNA 2010

## VIRÐING

Vit samstarva erliga og heiðurliga, vit skapa álit við at lurta og tryggja øllum møguleika at gera vart við sína hugsan.
Tí eru javnstøða og javnrættindi natúrlig og sjálvsøgd fyri okkum.

• Tað merkir, at vit lurta, eisini tá vit eru ósamd, at vit virðismeta fyritakssemi og altíð eru fús at taka stig til neyðugar broytingar, vit laga okkum eftir broyttum fortreytum, eggja til luttøku í orðaskifti og gjøgnumfremja broytingar skjótt.

## MENNING

Vit skapa dygd og virðisøking í tvørfakligum samstarvi, við fakkunnleika og í samskifti við borgaran.
Í arbeiðinum eru vit nýhugsandi, samskifta og endurnýta tey góðu úrslitini. Vit taka ábyrgd. Vit gera mun og hugsa øðrvísi og skapandi.

• Tað merkir, at vit støðugt menna førleikar, taka felags ábyrgd og samstarva. Vit síggja møguleikar í nýggjum hugsanum og loysnum. Styrkin er okkara fjølbroytni og innliving í sjónarhorn og krøv frá borgaranum, politiska myndugleikanum og samfelagnum sum heild, har vit altíð fáa sum mest burtur úr tilfeinginum á ein burðardyggan hátt.

## TRIVNAÐUR

Vit hava eitt arbeiðsumhvørvi í støðugari menning.
Vit virka í einum felagsskapi, har rúm er fyri ymiskleika.
Okkara trivnaður hevur týdning fyri trivnaðin hjá borgarunum.

• Tað merkir, at vit skapa tryggleika og nærveru gjøgnum umsorgan og menning. Tað merkir, at fjølbroytni og góðhýrur eiga stóran lut í arbeiði okkara. Tað merkir, at samfelagið fær ágóða av okkara trivnaði.



# VIRÐI ERU MÁTTMIKLAR KENSLUR



Ingibjørg Berg,
Kommunustjóri,

Orðið "virði" hevur uppruna í latínska orðinum "validus" og verður nýtt um okkurt, ið er "kraftmikið" ella "máttmikið".

Virði eru sum íbornar kraftkeldur, ið geva okkum styrki og dirvi til at virka og fylgja okkara sannføring - ikki bert eftir persónligum tørvi, men við støði í eini breiðari fatan av, hvat hevur týdning og gevur meining. Virði eru djúpar kenslur og sannføringar, ið ilt er at broyta.

Ole Fogh Kirkeby, professari, sigur m.a., at "tá starvsfólk fáa høvi at hugsa um síni virði og at samskifta um tey við starvsfelagar og leiðarar, verður úrslitið eitt meingi av meiningum í gerandisdegnum, sum verður gagnligt fyri bæði hin einstaka og arbeiðsplássið"!

Við øðrum orðum hava virði ein avgerandi leiklut í gerandisdegnum – bæði fyri einstaka starvsfólkið og arbeiðsplássið sum heild. Virði skapa virkisfýsni og áræði, eggja og geva íblástur. Brenna vit fyri onkrum, ella kenna vit, at eitt hvørt er virðismikið, avrika vit meira.

Ætlanin við hesum arbeiði var at greina og savna virðini, sum vit hava við okkum og um okkum í dagliga arbeiðinum, og sum við tíðini hava gjørt Tórshavnar kommunu til tað, hon er í dag. Ætlanin var eisini at skapa betri fatan av, at vit eru ein heild, sum lyftir í felag fyri at fáa bestu úrslit fyri hvønn einstakan, fyri arbeiðsplássið og fyri kommununa. Harumframt var endamálið at skilja hvønn annan betur og soleiðis virka í betri samlagi hvør við annan, tá ið vit øll verða meira tilvitað um, hvørji virði hava týdning í samspælinum okkara millum í gerandisdegnum.

Tá vit byrjaðu hetta arbeiðið, spurdu vit, hvørji virði hava størstan týdning í gerandisdegnum – og hava vit, sum starvast í Tórshavnar kommunu, somu virði?

Fyrra spurninginum hava vit í felag svarað. Seinna spurninginum kunnu vit í dag svara ja.

**1. PARTUR**
Fyrsti partur fór fram á stovnunum hjá kommununi, har einstaka starvsfólkið fekk høvi at leggja fram virði av týdning fyri tey sum starvsfólk í Tórshavnar kommunu. Samanløgdu virðini hjá stovninum vórðu síðani skrivað niður og send fyrisitingini at arbeiða víðari við í tilgongdini.

# TØRVUR Á VIRÐISGRUNDARLAGI

Vit høvdu tørv á at greina okkara egna virðisgrundarlag, tá ið virðistilgongdin varð sett í verk í Tórshavnar kommunu. Tískil høvdu vit longu innanhýsis tosað um hesi viðurskifti á dagstovnaøkinum, har greinað virði eru ein natúrligur partur av menningini frameftir.

Tað er gott at verða tikin við í tilgongdina, tí tað hevur stóran týdning, at fólk hava somu fatan og tulking av virðisorðunum, um vit skulu hava eitt felags grundarlag at virka á.

Vit høvdu ein góðan dag í Norðurlandahúsinum, har vit í bólkum skiftu orð um virði saman við øðrum yrkisbólkum. Vit skulu laga okkum eftir felags virðisgrundarlagnum, og virðini skulu tulkast og tosast inn í gerandisdagin á einstøku arbeiðsplássunum.



Birgit Debess,
námsfrøðingur



Michael Jacobæus,
landslagsarkitektur

# TAKIÐ VIRÐINI Í ÁLVARA

Higartil hevur tað verið torført at fingið eyga á yvirskipaðu virðini í Tórshavnar kommunu, hóast okkara felags virði helst eru onkunstaðni. Vit eru farin í eina spennandi og áhugaverda tilgongd, og tað er heilt týðiliga tørvur á henni á so stórum arbeiðsplássi, sum Tórshavnar kommuna er.

Starvsfólk í kommununi hava nógvar mannagongdir og reglur at halda seg til í dagliga arbeiðinum, og um virðini skulu vera til nakra nyttu og fyribyrgja ósemjum ella loysa truplar støður, so snýr tað seg um at vera tilvitaður um tey og taka tey í álvara. Tað er galdandi frá tí hægsta til tann lægsta.

# LURTIÐ VIÐ VIRÐING



Edna Jacobsen,
móttøkan

Tað upplivdist eitt sindur tungt at tosa um virði saman við so nógvum fólkum í Norðurlandahúsinum. Eg hugsaði í fyrstu atløgu, at tey, sum tora at tosa, stýra. Síðan fekk eg kensluna, at eg eri við til at skapa nakað gott í hesi tilgongdini. Eg vóni, at øll hava somu kenslu, so vit finna eitt felags stev.

Tað skal helst vera soleiðis, at vit merkja, at vit hava eitt felags grundarlag at virka á, so at borgarin eisini fær størri gleði av, at vit í størri mun taka støði í felags virðum.

Um vit eru tilvitað um virðini og eitt nú duga betur at lurta við virðing, so kunnu t.d. misskiljingar lættari beinast av vegnum.



Ingi Jacobsen,
húsavørður

# VIRÐI MERKIR GÓÐAR LEIÐREGLUR

Eitt felags virðisgrundarlag kann brúkast sum leiðregla hjá okkum at útinna dagliga arbeiðið. Tað er gott, at starvsfólkini eru við í tilgongdini og verða hoyrd. Eg haldi, virðini skulu lýsa okkum sum ein stovn, ið veitir góðar tænastur og loysir uppgávur fyri borgararnar.

Tað var spennandi at viðgera virði og virðisorð, og hetta læt eisini eyguni upp fyri, at tað ber til at síggja dagliga arbeiðið í einum øðrvísi ljósi.

Vit, sum eru húsavørðar hjá barnagørðunum, hava vanliga ikki brúkt okkara tíð og orku upp á virðisprát, men síðan hendan tilgongdin varð sett í verk, hava vit javnan tosað um, hvønn týdning virði í roynd og veru hava á einum arbeiðsplássi.



Allan Clementsen,
Reinhaldið

# GLEÐI MEG TIL FELAGS STEV

Okkara virðisprát hevði við sær, at vit eru meira tilvitaðir um evnið, hóast eg í fyrstu atløgu minnist tað eitt sindur ørkymlandi, sum eina rúgvu av góðum orðum, ið stóðu á eini talvu.

Prátið fór ymsar vegir, tá ið vit settust at tosa um virði. Happing á arbeiðsplássinum var eitt evni, sum varð tikið fram, men tað orðaskiftið flutti seg yvir í eitt meira uppbyggjandi prát um trivnað. Eg haldi, at tilgongdin fær glið á viðurskifti, sum annars verða tagd burtur.

Vit hava tørv á hesi tilgongdini, og tað verður gott at fáa møguleikan at viðgera virðisorðingarnar hjá leiðsluni eina ferð afturat. Tað er langt frá okkum, sum dagliga halda býin reinan, upp í ovastu løgini í fyrisitingini. Vit útinna ógvuliga ymisk arbeiði, men eg ivist onga løtu í, at vit kortini finna felags stev á einum væl orðaðum virðisgrundarlagi, og tað gleði eg meg til.

# VIRÐINI HAVA SAMANSJÓÐANDI VIRKNAÐ



Brian Sjúrðarson,
KT-deildin

Tað er hugaligt at síggja, at leiðslan spyr okkum og soleiðis velur eina demokratiska tilgongd, tá felags virðisgrundarlag skal finnast fyri arbeiðsplássini í Tórshavnar kommunu. Øll eru sloppin framat, og leiðararnir hava fingið høvi at leggja sínar hugsanir fram.

Tað er eitt nú gott at kenna virðisgrundarlagið hjá einum arbeiðsplássi, tá ið tú byrjar í nýggjum starvi. Tá er tað lættari at taka við nýggjari arbeiðsmentan.Tað snýr seg um at finna grundleggjandi virðini, sum síðani kunnu tulkast og útdýpast á teimum einstøku arbeiðsøkjunum í kommununi.

Eg eri sannførdur um, at tað ber væl til at samansjóða okkum øll undir somu virði.




Helga Rúnadóttir Øster,
lívbjargari

# GREIÐ VIRÐI ØKJA TRIVNAÐIN

Tað er gott at sleppa at hyggja at arbeiðsplássinum við øðrvísi eygum, men tað tók okkum tíð at koma fram til, hvat vit ítøkiliga skuldu gera í virðistilgongdini. Í fyrstani komu ymisk óloyst viðurskifti á arbeiðsplássinum til sjóndar, men tað endaði sum ein góður dagur.

Tá ið vit funnu stevið, vóru vit í roynd og veru ógvuliga samd. Svimjihylurin er eitt gott arbeiðsstað, men vit kunnu við einum ítøkiligum virðisgrundarlagi fáa eitt uppaftur betri arbeiðspláss. Vónandi kann hetta samansjóða okkum til at hækka tænastustøðið.

Samanumtikið haldi eg, at virðisgrundarlagið kann hava við sær betri samstarv og eitt betri arbeiðspláss. Greið virði bøta um trivnaðin bæði hjá okkum og borgarunum.



**2. PARTUR**
Stjórar og deildarleiðarar í kommununi savnaðu øll úrslit frá fyrsta parti. Tey lýstu á hesum grundarlagi grundvirðini hjá Tórshavnar kommunu.



Janus Isfeldt,
starvsfólkaleiðari

# RÁSARÚM UNDIR ÁBYRGD

Virðisgrundarlagið stuðlar undir hugburðin um at miðspjaða arbeiðsuppgávur, soleiðis at starvsfólk hava størri rásarúm at útinna sítt arbeiði undir ábyrgd.

Virðisorðini fevna so breitt, at tey kunnu geva grundleggjandi meining allastaðni – í umsitingini eins væl og á brennistøðini, í barnagørðum o.a.

Talan var um eina rúgvu av orðum, sum øll skiltu á sín egna hátt. Hóast tilgongdin í fyrstu atløgu kundi tykjast tung, so hevur hon lært okkum at skilja virðisorðini á sama grundarlagi, so øll kunnu brúka tey í dagliga arbeiðinum.

Ein virðissamanhangur verður nú gróðursettur ímillum øll starvsplássini í Tórshavnar kommunu. Eg vóni, at hetta fer at skapa størri virðing fyri arbeiðinum hjá hvørjum øðrum, og at vit frameftir t.d. fara at duga betur at viður kenna, at onnur kunnu loysa uppgávur øðrvísi enn ein sjálvur.

# SAMTYKT UM FELAGS ATFERÐ

Afturlítandi byrjaði virðistilgongdin sum eitt kjak um orð, har øll høvdu sína hugsan, men hon endaði sum ein samtykt um felags atferð á sama virðisgrundarlagi.

Vit hava okkara persónliga virðisgrundarlag, sum vit fáa í uppvøkstri, í arbeiðsumhvørvi og umvegis lívsins lærdóm. Tí liggja virðini sjálvsagt djúpt í okkum, men vit hava í hesi tilgongdini spakuliga fingið eina felags fatan, sum gagnar Tórshavnar kommunu, okkum persónliga og borgarunum.

Orðið virðing kann t.d. hjálpa okkum at taka starvsfelagar og trupulleikar, sum teir eru, og torførir spurningar kunnu við virðingini í huga loysast við størri tolsemi. Tú kanst hava sterkar kenslur fyri tínum íkasti, tá ið tú fert í holt við eina verkætlan, og við virðisgrundarlagnum fara vit helst at duga betur at taka við hugskotum og hugsanum hjá øðrum pørtum í verkætlanini.

Eg meti tað týdningarmikið, at vit dagliga eru tilvitað um virðisgrundarlagið í okkara dagliga arbeiði og samskifti bæði uttanhýsis og innanhýsis. Vit eru, tá ið av tornar, øll í sama báti.



Harald Bjørgvin,
leiðari í húsaumsitingini



Katrin Petersen,
leiðari á barna- og ungdómsdeildini

# VIRÐINI LÍMA OKKUM SAMAN

Virðini eru límið, sum bindur okkum saman í eina eind. Vit eiga dagliga at útinna okkara arbeiði í tráð við virðisgrundarlagið. Virðini samansjóða okkum til at halda somu kós, hóast vit grundleggjandi eru ymisk sum menniskju.

Tá ið vit skulu røkka málum og loysa trupulleikar á arbeiðsplássinum, kunnu vit vísa til virðisgrundarlagið, sum vit eisini eiga at taka til viðgerðar javnan, so at vit áhaldandi halda lív í virðisorðunum og minna okkum á okkara felags grundvøll.

Tað var torført at velja virðisorðini, men tað var spennandi at arbeiða saman við øðrum fakbólkum í hesi tilgongdini, sum hevur verið sera virðismikil fyri okkum. Vit hava í hesi tilgongdini fingið eitt breitt virðisgrundarlag, sum øll kunnu kenna seg aftur í.

Øll hava brúk fyri etikki, og hetta er okkara etikkur, sum m.a. kann gera, at vit duga betur at samskifta og lurta eftir hvørjum øðrum. Virðisgrundarlagið eigur at vera ein natúrligur partur av okkara arbeiði frameftir.

# OKKARA GRUNDLÓG UM ATBURÐ



Jóhan Simonsen,
leiðari á løgdeildini

Virðisgrundarlagið er at meta sum grundlógin undir okkara arbeiðslagi og atburði, og tí skal okkara dagliga framferð ikki ganga ímóti virðisgrundarlagnum.

Tilgongdin hevur havt stóran týdning fyri at skilja tørvin á at fáa virðini fram í ljósið. Hóast vit stundum vóru ósamd fyrst í tilgongdini, so hava vit nú funnið nøkur alfevnd virðisorð, sum øll kunnu taka undir við.

Virðisgrundarlagið fer at lætta um gerandisdagin hjá okkum, sum starvast hjá Tórshavnar kommunu, eins og virðisorðini eisini verða hollar leiðreglur hjá nýggjum starvsfeløgum.

Á flestu arbeiðsplássum í kommununi snýr hendan tilgongdin seg helst bæði um eina hugburðarbroyting og staðfesting av verandi arbeiðslagi og hugburði. Tá ið eg síggi virðisorðini, so eri eg í øllum førum meira tilvitaður um hesi viðurskifti. Øll starvsfólk hava sína serligu ábyrgd av at halda virðisorðunum á lívi.



Bjørgfríð Ludvig,
miðfyrisitingarstjóri

# VIRÐISGRUNDARLAGIÐ ER MÍN LEIÐARSTJØRNA

Virðisorðini vísa okkum vegin, og eg havi tey sum mína leiðarstjørnu í dagliga arbeiðinum.

Virðini eru vegleiðandi fyri okkara atferð og hvussu vit útinna okkara arbeiði. Tey eru eitt slag av góðskustýring og eitt felags grundarlag at virka á. Virðini hava soleiðis stóran týdning bæði innanhýsis og uttanhýsis.

Rákið í samfelagnum er, at arbeiðspláss orða sítt egna virðisgrundarlag. Hetta er eisini vorðið eitt krav frá bæði starvsfólkum og borgarum, sum vilja vita, hvat tey hava við at gera.

Eg eri fegin um, at vit valdu at taka starvsfólkini við í virðistilgongdina, tí tað gevur eina størri ognarkenslu í verkætlanini, sum øll hava tikið væl ímóti. Vit hava fingið trý virðisorð burtur úr teimum 40 orðunum, sum starvsfólkini vístu á í tilgongdini.

Ein yvirskipað tulking er fest aftur at hesum trimum orðunum, sum veruliga koma til sjóndar í gerandisdegnum, tá ið ymsu deildirnar tulka og arbeiða virðisgrundarlagið meira inn í sítt arbeiðsøki. Virðini skulu áhaldandi røkjast við ymsum virðisátøkum, so tey verða verandi í okkara tilvitsku. Tá er virðisgrundarlagið endaliga sett í verk í Tórshavnar kommunu.

**3. PARTUR**
Býráðið orðaði visiónina fyri Tórshavnar kommunu.

# VISIÓNIN

## OKKARA HØVUÐSSTAÐUR - VIRKIN OG VAKIN

## VAKSTRARDEPIL Í NORÐURATLANTSHAVI

- Vit vilja, at høvuðsstaðurin er alheimsgjørdur og fjølbroyttur. Her skal verða rúm fyri ymiskum áskoðanum, hugskotum og mentanum, tí soleiðis verður gott hjá øllum at liva, búgva og virka
- Vit vilja, at høvuðsstaðurin er livandi, við upplivingum og avbjóðingum, men eisini við tryggleika og nærleika
- Vit vilja, at høvuðsstaðurin er virkin, við nýggjum og mennandi útbúgvingartilboðum og dygdargóðum altjóða granskingarumhvørvi
- Vit vilja, at høvuðsstaðurin er burðardyggur búskaparliga, sosialt og umhvørvisliga
- Vit vilja, at høvuðsstaðurin gevur nýggjum og altjóða vinnum, og vinnum, sum hava djúpar røtur her, góð vakstrarlíkindi
- Vit vilja, at høvuðsstaðurin er effektivur og framtakshugaður, við skjótari og góðari tænastu til borgarar og vinnu
- Vit vilja, at høvuðsstaðurin tænir øllum føroyingum í avgerandi leikluti sínum at ganga á odda í menningini



# KÓSIN ER SETT

Visiónin hjá Tórshavnar kommunu er ein felags politisk kós, sum skal skapa menning, tryggleika og trivnað frameftir.

Býráðið hevur einmælt samtykt politisku visiónina, og tað er tekin um støðufesti, hóast vit kunnu vera ósamd í einstøku politisku málunum. Visiónin er ramman um politiska arbeiðið, har vit yvirskipað eru samd um, hvørja leið vit halda – høvuðsstaðnum, borgarunum og øllum Føroya landi at frama.

Visiónin er saman við virðisgrundarlagnum eitt haldgott støði hjá starvsfólkum í Tórshavnar kommunu at virka á. Talan er um eitt sterkt grundarlag, ið skapar tryggleika hjá starvsfólkunum, sum altíð kunnu halda fast um visiónina og virðini, sama hvussu politisku vindarnir blæsa.

Nógvir ymiskir samfelagsbólkar, sum virka í Tórshavnar kommunu, hava givið okkum íblástur til visiónina. Sostatt er hon kjølfest breitt í kommununi, sum við hesum eisini greitt hevur boðað frá, hvussu okkara høvuðsstaður skal gerast ein týðandi vakstrardepil í Norðuratlantshavi við góðum viðurskiftum við øll onnur øki í Føroyum og við sterkum bondum út í heim.

Visiónin vísir tryggu leiðina, og hon er sostatt eitt barometur hjá borgarunum, tá ið teir skulu meta um, hvørt vit politikarar veruliga vísa í verki, at vit arbeiða í samsvari við settu kósina.



Heðin Mortensen, borgarstjóri,
Javnaðarflokkurin



Bogi Andreasen, 1. varaborgarstjóri,
Tjóðveldi

# KARMURIN UM FRAMTÍÐINA

Okkara visión vísir, at okkara høvuðsstaður vil nakað bæði í Føroyum og uttanlands, og hon setir karmin um framtíðina. Innan hendan karm kunnu vit útinna politisku ætlanirnar, sum í høvuðsheitum eiga at fylgja visiónini, hóast vit ikki altíð eru samd í dagliga politikkinum.

Visiónin gevur okkum áræði til framhaldandi at byggja land í eini nýggjari tíð saman við øðrum pørtum av Føroya landi, og hon gevur okkum dirvi at taka lógvatak við umheimin. Hon samantvinnar vinnulív, mentan og sosialar umstøður upp í eina hægri eind, har trivnaður er loysunarorðið.

Hon skapar tryggleika hjá starvsfólkunum í øllum pørtum av kommununi, tí málið er greitt, sama hvussu ógreiðar ymsu politisku viðmerkingarnar stundum kunnu vera.

Borgarin fær við visiónini greiðari at vita, hvat hann kann vænta sær í Tórshavnar kommunu, har leiðin er løgd ímóti einum norðuratlantiskum vakstrardepli, sum er virkin og vakin.

# RAMMAN UM POLITISKA LEIKIN



Annfinn Brekkstein, býráðslimur,
Sambandsflokkurin

Einmælta politiska semjan um visiónina hjá Tórshavnar kommunu fer at hava við sær framfýsni og framdrátt í kommununi, eins og hon eisini verður við til at flyta alt landið fram á leið. Havnin er karmur um nógv virksemi, og breiða politiska semjan í høvuðsstaðnum fer helst at draga aðrar partar av landinum við sær.

Visiónin er ramman um politiska leikin, sum ivaleyst verður meira semjusøkjandi, nú vit eru vorðin samd um, hvørja leið Tórshavnar kommuna skal halda inn í framtíðina. Yvirskipaða semjan bindur okkum saman at røkka einum felags máli, hóast politiskar ósemjur og kjak eru á vegnum fram ímóti málinum.

Tey, sum starvast hjá kommununi, kenna eisini leiðina, og tískil verður tað lættari hjá teimum í dagliga arbeiðinum at flyta býin fram eftir settu kósini. Havnarborgarar fáa í framtíðarætlanini betri og støðugari tænastur, sum økja trivnaðin.

Visiónin ger okkum greitt, at vit øll arbeiða fyri býin.




Jan Christiansen, býráðslimur,
Fólkaflokkurin

# FELAGS DREYMUR UM FRAMBURÐ

Ein og hvør okkara hevur sín dreym um ein betri høvuðsstað. Visiónin orðar okkara felags dreym um Tórshavnar kommunu sum ein vakstrardepil í Norðuratlantshavi, uttan at vit fara í politiskar smálutir.

Málið er m.a. at fáa væl útbúgvið fólk heim aftur til Føroyar, tí um vit ikki eru varin, kann alheimsgerðin súgva virðismikið menniskjatilfeingið úr okkara frammanundan fámenta samfelag.

Ein sterkur høvuðsstaður kann vera við til at menna aðrar partar av landinum, eins og vit eisini fáa styrkt sambandið við útheimin. Ein virkin og vakin høvuðsstaður skal draga fólk hendavegin til trivnað og avbjóðandi arbeiðsumhvørvi. Starvsfólk hjá Tórshavnar kommunu kunnu við hesum í huga miðvíst vera við til at menna Havnina, hóast vit í dagliga politikkinum ikki altíð draga eina línu.

Fíggjarligt skynsemi og fíggjarligt rásarúm eru fyritreytir, sum skulu lúkast, um vit skulu røkka visiónini. Borgarin eigur at kenna okkara ætlanir og dreymar, men framtíðarmyndin skal eisini vera veruleikakend, og tann ábyrgdin hvílir á okkara politisku herðum.



**4. PARTUR**
Virði og visión.

# VIRÐI OG VISIÓN

- verða sett í verk, og hesi skulu áhaldandi røkjast.
Á henda hátt verða virði og visión ein natúrligur partur av arbeiðinum hjá starvsfólkum í Tórshavnar kommunu.



TÓRSHAVNAR
KOMMUNA

ANNIJANNI
Prent: Føroyaprent Svanamerktur prentlutur, 541 705